Síggja ikki milt uppá eykajáttanir

Tað skulu serliga góðar grundgevingar fyri at lata eykajáttanir, sigur Óli Breckmann, formaður í fíggjarnevndini

STRANDFERÐSLAN
Áki Bertholdsen

– Vit síggja ikki serliga milt upp á eykajáttanir.

Óli Breckmann, formaður í fíggjarnevndini, er alt annað enn fegin um at lata Strandferðsluni eykajáttan.

Serliga til vanligan rakstur, sum tað her er talan um, er formaðurin í fíggjarnevndini trekur at lata eykajáttan.

– Nú tekin eru um, at búskaparliga framgongdin er við at venda, er tað serliga umráðandi at halda tátt, sigur Óli Breckmann, formaður í fíggjarnevndini

– Og skulu eykajáttanir latast til rakstur, skulu sparingar helst finnast onkra aðrastaðni so at samlaðu útreiðslurnar á fíggjarlógini ikki hækkað, sigur Óli Breckmann.

Nú vísir Strandferslan á, at hon hevur roynt at spart, men at samgongan tók avgerð um at taka spariltøkini aftur. Eiga tit so ikki at taka avleiðingarnar av tí?

– Tað er als ikki vist. Spurningurin er um vit ikki kunnu áleggja Strandferðsluni at seta sparingar í verk onkra aðrastaðni.

– Men hinvegin mugu vit siga, at politiski viljin hevur gjørt, at Strandferðslan kundi ikki seta ætlaðar sparingar í verk og so mugu vit finna orsøkirnar til tað. Meirilutin í Løgtinginum hevur álagt Strandferðsluni at hava eitt virksemi sum ger, at játtanin ikki kann halda og kanska játtar sami meirluti henni eisini eina aðra eykajáttan, ella kanska verður álagt stovninum at finna sparingar.

Løgið

Óli Breckmann leggur afturat, at Strandferðslan hevur ein umsetning uppá einar 160 milliónir og tað skal vera undarligt, ber tað ikki til at laga raksturin soleiðis at fýra milliónir kunnu sparast burturav so stórari upphædd.

Formaðurin í fíggjarnevndini sigur, at ein orsøk til at tað ikki er lætt hjá almennum stovnum er kanska tí, at Løgtingið mangan hevur tvær dagsskráir.

– Øðrumegin ásetir Løgtingið Strandferðsluni eina upphædd, men táið so tænastustøðið, sum fæst burturúr játtanini, ikki samsvarar við tað, sum løgtingið krevur, so eru áhugamálini mótstríðandi og so verða eykajáttanir lætnar.

– Fólk vilja fegin hava lægri útreiðslur, men táið so sparingar raka teirra serligu áhugamál, antin tí at lokalpolitikkur tekur seg upp, ella tí at onkur arbeiðir hjá Strandferðsluni og so verður givið eftir.

Óli Breckmann sigur, at fyrrenn politikarar vísa neyðuga støðufesti, koma vit ikki hesum til lívs.

Hann sigur, at nú tekin eru um, at búskaparliga framgongdin er í minking, er tað serliga umráðandi at halda tátt.

– Tað kann heldur ikki vera rætt, at hallið hjá Strandferðsluni veksur so hvørt sum uppgávurnar minkað tí at leiðir verða niðurlagdar og tí mugu vit fáa eina góða frágreiðing frá Strandferðsluni um, hví tað ikki ber til at halda játtanina.

Eins og Tórbjørn Jacobsen, nevnir Óli Breckmann eisini møguleikan at privatisera lastbilarnar.

Trekir at lata Strandferðsluni eykajáttan

Samgonguni hóvar illa at almennir stovnar fáa eykajáttan uttan táið okkurt heilt serligt er áfatt

STRANDFERÐSLAN
Áki Bertholdsen

Boðini eru, at skulu eykajáttanir latast, skulu sparingar finnast onkra aðrastaðni, sigur Karsten Hansen

Nú er aftur galið hjá Strandferðsluni.

Sum vit greiddu frá í Sosialinum týsdagin, kemur Strandferðslan at mangla nakrar milliónir í ár fyri at kunna halda fram við teirri sigling og teirri koyring, sum nú er.

Nýggjastu metingarnar hjá Strandferðsluni vísa, at játtanin í ár fer ikki at halda, men at 4,3 milliónir fara at mangla í.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, hevur søkt um eina eykajáttan til Strandferðsluna.

Men ikki allir limir í samgonguni eru so fegnir fyri at geva almennum stovnum eykajáttanir, so tað er ivasamt um Strandferðslan fær nakrar pengar, ella um hon noyðist at spara, ella um hon bara fær ein part av tí, sum restar í og so noyðist at spara ein part.

Torbjørn Jacobsen úr tjóðveldisflokkinum, limur í fíggjarnevndini og Óli Breckmann úr fólkaflokkinum, sum er formaður í fíggjarnevndini, eru tveir tinglimir úr samgonguni, sum hava verið trekir at góðtaka eykajáttanir.

Og tað endurtaka teir einaferð enn, nú Strandferðslan vil hava eykajáttan.

Viðgera umsóknina

Og Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at treytin er, at sparingar verða gjørdar onkra aðrastaðni so at fíggjarlógin ikki hækkar.

Hann sigur at hann nú fer at viðgera umsóknina um eykajáttan.

Men eisini hann spyr um tað ikki ber til at leggja virksemið hjá Strandferðsluni um fyri at útvega fleiri inntøkur, ella fyri at spara.

Hann nevnir Sam sum eitt dømi, sum í vetur ikki er byrjaður at sigla um Lorvíksfjørð um morgunin, fyrrenn trokingartíðin er av og sum gevst áðrenn trokingartíðin byrjar aftur seinnapartin, so at Dúgvan hevur siglt einsamøll, táið á stendur, meðan Sam er settur í sigling, tá ið ferðslan er minkað og verður tikin úr aftur sigling, áðrenn ferðslan økist aftur um kvøldið.

Hann spyr eisini, hví tað hevur tikið fýra ár at kanna um tað ber til at samskipa flutningin hjá lastbilum og bussum hjá Strandferðsluni og hjá Postverkinum, tí tær kanningarnar skuldu byrja í 1999.

Hann viðgongur tó, at Strandferðslan er ein trupul stovnur at stýra, tí hann er so umfatandi.

Hetta má halda uppat

Tað gongur ikki, at Løgtingið skal lata eykajáttanir, hvørja ferð ein stovnur ikki klárar at halda játtanina, sigur Tórbjørn Jacobsen, limur í fíggjarnevndini

STRANDFERÐSLAN
Áki Bertholdsen

– Vit hava ikki samtykt eina fíggjarlóg við tí fyri eyga at samtykkja fleiri eykajáttanir aftaná, tí tað er skyldan hjá stovnsleiðarumat halda játtanina, sigur Tórbjørn Jacobsen, limur í fíggjarnevndini

– Táið vit gera eina fíggjarlóg, má útgangsstøðið vera, at hvør einstakur stovnur skal halda játtanina Tórbjørn Jacobsen, limur í samgonguni, er alt annað enn fegin um at lata Strandferðsluni eykajáttan í ár.

– Strandferðslan hevur fingið eina játtan á fíggjarlógini og stjórin á hevur skyldu at halda seg innanfyri tað, tí peningur er ikki til nakað annað.

Tórbjørn Jacobsen sigur, at tað var næstan eitt samt Løgting, sum samtykti fíggjarlógina og har var ein upphædd sett av, sum Løgtingið helt, at Strandferðslan skuldi kosta í ár.

– Og vit hava ikki samtykt eina fíggjarlóg fyri at síðani at lata eykajáttanir.

Hann sigur, at hetta má halda uppat, at stovnsleiðarar frá ársbyrjan vænta sær eykajáttanir, fáa teir ikki roknistykkið at ganga upp og leggja virksemið til rættis eftir tí.

Hann leggur tó dent á, at hann við hesum ikki hevur sagt, at tað er hetta, sum stjórin á Strandferðsluni hevur gjørt.

Nú vísir Strandferðslan á, at hon royndi at seta sparingar í verk, men at politikararnar noktaðu henni at seta tær í verk?

– Tað kann væl vera, men eg haldi eisini at sparingarnar vóru sera »væl valdar«, tí tær raktu akkurát tey eymastu punktini.

– Vit vita, at verða sparingar settar í verk í siglingini um Lorvíksfjørð, fer tað mest sum av sær sjálvum at føra eina eykajáttan við sær.

Hvar skal Strandferðslan so spara?

– Tað veit eg ikki, tí eg kenni ikki stovnin innan í frá og tað er heldur ikki mín uppgáva.

Men kortini nevnir hann, at ein møguleiki kundi verið at Strandferðslan slapp sær av við lastbilarnar.

– Ongastaðni í verðini, uttan á Kuba ella í Norðurkorea er tað ein almenn uppgáva at koyra farm út til fólk fyri fyri næstan onki.

– Tórbjørn Jacobsen sigur, at spurningurin er um strandferðslan skal hava allar tær uppgávurnar, sum hon hevur nú og hann heldur, at eitt hugskot kundi verið, at hon slapp sær av við lastbilarnar.

Tórbjørn Jacobsen sigur kortini, at kemur ein umbøn um eykajáttan, fer hann sjálvsagt at viðgera hana, men útgangstøðið er heilt greitt tað, at Strandferðslan skal klára seg við tað, sum er sett av á fíggjarlógini.

– Strandferðslan manglar 4,3 milliónir og tað skal vera løgið, skal tað ikki bera til at spara eina millión hvønn ársfjórðing av tí stóra tali, sum Strandferðslan fær, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum gleddu okkum á 80 ára degnum 16. mai.

Ein serlig tøkk til tykkum á Café Karsborg.

Blíðar heilsanir
Elisabeth Hentze og Dávur Clementsen

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góði maður og okkara kæri pápi, abbi, langabbi og verfaðir

Dánial H. Davidsen
málarameistari í Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánamorgunin 16. juni, 79 ára gamal.

Tvær ídnar hendur hava lagt árarnar inn í dag.
Eitt hjarta av gull hevur sligið sítt síðsta slag.
Tað ljósið vil altíð í okkara hjørtum vera.
Saknurin av tær vit mugu bera.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju í dag, hósdag 19. juni kl. 13.00.

Poulina og børnini
Kári, Bogi, Peddy, Eyðbjørg
Áki og Dánial Pauli v/ fam.

Vit eiga ábyrgdina av svartkjaftinum

Føroyar og ES eiga ábyrgdina av svartkjaftinum, tí hann ferðast í okkara sjógvi. Hetta hava vit tosað um á vitjanini í Brussel, sigur løgmaður, sum millum annað hevur vitjað ES og NATO á ferðini í belgiska høvuðsstaðnum

UTTANLANDSVITJAN
Edvard Joensen

Løgmaður hevur tosað við fiskivinnumyndugleikarnar í ES um fiskivinnumál, sum viðkoma bæði Føroyum og ES. Millum annað var svartkjafturin til viðgerðar.

– Vit tosaðu um, at vit hava ábyrgdina av svartkjaftinum, tí hann ferðast mest í ES- og føroyskum sjógvi, greiðir Anfinn Kallsberg løgmaður, frá. Nú er tað soleiðis, at fleiri lond lata síni skip fiska púra frítt av svartkjaftastovninum, og tað halda vit ikki vera rætt, sigur hann.

Tosað varð um, sigur løgmaður, hvussu gerast kann til tess at verja stovnin við at fáa veiðuna undir skipað viðurskifti. Men avtala var kortini eingin gjørd.

Eisini aðrar fiskivinnuspurningar viðgjørdi løgmaður við ES myndugleikar. Umframt handilsspurningar, sum í og fyri seg hoyra fiskivinnuni til.

Talan var millum annað um sonevndu kumuleringsskipinina, sum líkasum hevur staðið parkera eina tíð. Gongd er nú fingin á tað málið aftur.

Tosað varð millum annað við fiskimálaráðið hjá ES um hvussu gerast kann fyri at sleppa undan, aðrir brúka Føroyar til at fáa sín fisk inn á ES marknaðin.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, hitti eisini NATO aðalskrivaran, George Robertson, á ferðini í Brússel.

Teir báðir tosaðu um trygdarpoitisk mál, sum hava við NATO og Føroyar at gera.

NATO hevur ikki gjørt tað stóra burtur úr viðurskiftunum við Føroyar, men nú verður so roynt at fáa eina tilgongd í lag, so okkara áhugamál eisini verða tikin við, sigur løgmaður.

– Vit hava ongar avtalur gjørt við NATO, men vit hava fingið sett fokus á okkara viðurkskifti, sigur hann.

Áðrenn løgmaður fór úr Brússel í gjár, skuldi hann vitja EFTA húsið, har íslendingar og norðmenn halda til. Har skuldi hann frætta eitt sindur um støðuna hjá londunum, sum standa uttan fyri ES, nú rættilig gongd er í málinum um at víðka ES munandi eystureftir.

Løgmaður hevur á vitjanini í Brússel eisini hitt finska ES umboðsmannin, sum umsitir viðurskiftini hjá ES við Norðurlond og arktiska økið, har eisini føroysk viðurskifti liggja undir. Eisini hevur løgmaður vitjað í ES Parlamentinum. Áðrenn farið varð at hitta NATO aðalskrivaran, varð vitjað hjá danska NATO sendiharranum í Brússel.

Løgmaður skuldi væntandi koma aftur til Føroya í gjár.

Á ferðini í Brússel hitti Anfinn Kallsberg, løgmaður millum onnur NATO aðalskrivaran, Geroge Robertson

Gjalda við korti í Vágatunlinum

Nú ber til at gjalda við korti, tá koyrt verður gjøgnum Vágatunnilin. Men uppsetta skipanin virkar ikki nøktandi, so talan er um tveir leysar terminalar, sum eru við gjaldstøðina

FERÐSLUGJALD
Edvard Joensen

Vágar: Enn virkar gjaldsstøðin við Vágatunnilin ikki nøktandi, so hóast nú kortini verður goldið við korti, er tað ikki uppsetta gjaldstøðin, sum avgreiðir gjaldið, men tveir leysir terminalar, sum Vágatunnilin hevur fingið til endamálið.

Av skrivstovuni hjá Vagatunlinum siga tey, at skipanin sum so virkar. Tað vil siga, at hon klárar at taka í móti kortinum og trekkja peningin av konto, hjá eigaranum. Men hon slóknar ov ofta, og tað eru tey ikki nøgd við, tí tað er ikki nóg trygt.

Tískil hava tey fingið tveir GSM terminalar, sum fólk so framvegis situr og passar. Og tað kostar so aftur óneyðugar pengar.

Men tað er neyðugt fyri at fólk skulu kunna greiða síni gjøld beinanveg. Og tað vilja tey flestu, sum ikki hava kubba. Eisini er tað ein fyrimunur, nú fleiri og fleiri útlenskir bilar vitja. Men tað gevur ikki minni arbeiði á skrivstovuni hjá Vágatunlinum, siga tey.

Ferðslan gjøgnum Vágatrunnilin vaks fram til mai mánaða, tá hon minkaði eitt sindur aftur. Men tað meta tey á skrivstovuni vera orsakað av verkfallinum. Og nú hálvur juni er farin, er hon vaksin munandi aftur og fer ivaleyst at líkjast tí, roknað varð við. Nøkur neyv uppgerð er kortini ikki gjørd enn.

Sagt verður, at prísirnir, sum nú eru galdandi, fara at halda í hvussu er hetta árið út. Tá so gjørt verður upp, kann vera, at tosað fer at verða um, hvørt teir skulu broytast ella ikki.

Tey, sum vilja gjalda við korti fyri at koyra gjøgnum Vágatunnilin, kunnu nú gera tað, hóast uppsetta skipanin ikki virkar til fulnar. Hjá teimum, sum hava kubba, er hinvegin ikki neyðugt at minka ferðina, tá koyrt verður fram við støðini
Mynd: Edvard Joensen